

# Væl royndur nýbyrjari - Jennifer Jason Leigh

**The Anniversary Party snýr seg um eina veitslu, ið broytir tey luttakandi. Hesin skemtilig og samstundis álvarsama filmurin viðger universel fyribrigdir sum forhold, hjúnarband og børn.**

**Jennifer Jason Leigh**
Hendan sjónleikarinnan dámar væl avbjóðingar og er als ikki bangin fyri at taka á seg truplar leiklutir. T.d. tapti hon seg heili 40 kilo í sambandi við ein leiklut, har hon var ein anoretikari, eina aðruferð tók hon 10 kilo uppá fyri at fylla leiklutin sum ein skøkja og ein fastur arbeiðsháttur hjá henni er, at hon skrivar dagbók fyri hvønn einasta leiklutin, sum hon hevur. Men í hesum filminum frá 2001 er hon ein av leikarunum, søguskrivari og fyri fyrstu ferð eisini leikstjóri.
Jennifer Jason Leigh hevur leikt heldur merkverdigar og krevjandi leiklutir, hetta hevur givið henni virðing millum hyggjarar og atfinnarar. Fyri hesar leiklutir hevur hon eisini vunnið virðislønir. Fyri leiklutin sum skøkja í Last Exit (1989) hevur hon vunnið eina virðisløn og í filminum Short Cuts vann hon eina Golden Globe.

**The Anniversary Party**
Filmurin gevir eina mynd av einum hjúnarbandi, ið strekkir seg yvir 24 tímar. Hollywood-parið Sally og Joe hava seks ára hjúnarbandsdag og hava bjóðað øllum sínum vinum til veitslu. Tey bæði hava tó ikki verið so nógv saman, men nú skulu tey so royna aftur.
Joe Therrian er ein handritshøvundur og pallstjóri, Sally er ein eldri sjónleikarinna síðst í 30´unum. Tey bæði keglast m.a. tí hann er ótrúgvur, hevur eina rúsevnismisnýtslu og at hann hevur avgjørt ikki at hava Sally við í hansara seinasta filmi. Hann vil heldur hava eina unga vakra sjónleikarinnu (Gwyneth Paltrow) við í filmin, sum jú eisini er bjóðað í veitsluna. Hjúnarbandið er sostatt sera strongt.
Filmsummælarar meta filmin vera ein betri enn miðal filmur og verdan at hyggja eftir. Ein filmur um vinir og hjún, gjørdur av vinum og hjúnum. Í samrøðu við norska FilmMagasinet sigur Leigh:
-Vit høvdu hug at gera ein film um ting vit kenna til.
Søgan er gjørd til Hollywood og øll tey vit møta eru í filmsvinnuni. Men filmurin snýr seg um tey universellu tingini sum forhold, hjúnarbond og børn.
Filmurin er skrivaður og komin í lag í samstarvi við góða vin hennara, Alan Cummings. Eisini eru allir sjónleikararnir í filminum nærmastu vinir við Leigh og Cummings, m.a. hjúnarparið Kevin Kline og Phoebe Cates, Gwyneth Paltrow og John C. Reilly.

**Digitalt**
Leigh var við í danska dogmufilminum The King is Alive, sum jú bleiv tikin upp við digitalum myndatóli. Somuleiðis er hesin filmurin tikin upp digitalt.
-Frælsi og tað einfalda við at arbeiða við digitalum myndtólum rørdi meg sera nógv. The King is Alive bleiv tikin upp eftir stutta tíð, vit høvdu kunnað fingið filmin í kassan eftir 3 vikum, um vit arbeiddu tólv tímar um dagin.
The Anniversary Party bleiv tikin upp eftir 19 døgum í einum vøkrum Hollywood húsum.
Tað trupla við at taka upp digitalt er at føra myndirnar yvir á vanligan film, sum síðan verður vístur í biografum og aðrastaðni. Ofta fara myndirnar illa í hesi tilgongdini.
-Vit vildu hava tað at síggja út sum ein film heldur enn ein digitalan videofilm. So vórðu vit so heppin at fáa John Bailey at pynta myndirnar. Vit brúktu nógva tíð uppá at betra hvørja mynd.





**Jennifer Jason Leigh**

**Nakrir filmir hon hevur verið við í:**
In The Cut 2003
Road to Perdition 2002
The Anniversary Party 2001
The King is Alive 2000
eXistenZ 1999
Washington Square 1997
Bastard Out of Carolina 1996
Kansas City 1996
Georgia 1995
Dolores Claiborne 1995
Einlig kvinna søkir... 1992
Rush 1991
Backdraft 1991
Miami Blues 1990
Last Exit 1989
Heart of Midnight 1988

**The Anniversary Party frumsýning á Canal+ fríggjakvøldið kl. 19.00**





Spenn trygdarbeltið ...

... tí stjørnurnar leika í.

Við einum CanalDigital-haldi eru nervarnir á vandaleið. Rás eftir rás sendir spenningsfilmar og -roðir, so tað ræður um ikki at rista á hondunum, tá veljast skal.

Kom inn á gólvið og tosa við okkum um teir ymisku pakkamøguleikarnar.

Møguleiki er eisini fyri at tekna DR1 og DR2-hald.

Family við Canal+ 299,- pr. mðr
Nokia móttakari* 990,-
Skálkampur + Inb 990,-

*Treytað av 12 mðr. Family við Canal+ haldi. Harumframt 390,- kr. fyri stovnan og fyrsta hálvárliga kortgjaldið

- tað er munur á!

Family við Canal+

AP-Radio Klaksvíksvegur • 700 Klaksvík Tel 21 64 50 • Fax 45 73 50
G.F.Elektronik Birnugøta 31 • FO-100 Tórshavn Tel 31 02 54 ella 21 02 54
Radiohandilin OPUS 620 Runavík • Tel 47 99 99
Radiohandilin v/ Echardt & Pola Persson Sp/f Niels Finsensgøta 16 - Tel 318277
Radio-Service Vágur Tel 37 35 00 ella 21 35 00
P/F Sørvágs Radiohandil 380 Sørvágur - Tel 33 26 14
CANAL DIGITAL




VARPIÐ